FYLGISKJAL LM-115/2020

Hanna D. Andreassen

Fra: Atli Suni Leo
Sendt: Tuesday, January 26, 2021 09:23
Til: Alda Joensen
Cc: Mentamálaráðið; Fíggjarmálaráðið; Bjarni Askham Bjarnason
Emne: Hoyringssvar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um miðlastuðul
Vedhæftede filer: Til hoyringar Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um miðlastuðul. Freist 21. januar 2021.docx

Opfølgningsflag: Opfølgning
Flagstatus: Afmærket

Hey Alda

Fíggjarmálaráðið hevur hesa viðmerking til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um miðlastuðul:

Gjørt verður vart við, at samlaða upphæddin til fleiráraverkætlan skal útreiðsluførast í tí fíggjarárinum, tilsøgnin verður givin.
Dømi: Verður í 2021 givin tilsøgn til verkætlan um stuðul á 200 tús. kr. árliga í 3 ár, so skulu allar 600 tús. kr. útreiðsluførast í 2021.

Vh Atli Suni Leo
Ráðgevi

Fra: Alda Joensen <AldaJ@ummr.fo>
Sendt: 4. januar 2021 14:42
Til: 'blf@blf.fo' <blf@blf.fo>; 'dimma@dimma.fo' <dimma@dimma.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; 'setur@setur.fo' <setur@setur.fo>; industry@industry.fo; 'kvf@kvf.fo' <kvf@kvf.fo>; 'lindin@lindin.fo' <lindin@lindin.fo>; 'info@nordlysid.fo' <info@nordlysid.fo>; 'r7@r7.fo' <r7@r7.fo>; Sosialurin <post@sosialurin.fo>; Kundatænastan á TAKS <taks@taks.fo>; 'arnig@in.fo' <arnig@in.fo>; 'jon@kvf.fo' <jon@kvf.fo>; Jógvan Poulsen <radio@radio.fo>; joanis@jn.fo; midlar@midlar.fo; starvsmannafelag@starvsmannafelag.fo; vp@vp.fo
Emne: TIL HOYRINGAR: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um miðlastuðul. Freist 21.1.2021

Góðu tit

Viðheft verður uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um miðlastuðul sent til hoyringar.

Uppskotið leggur upp til at broyta lógina, soleiðis at stuðulin til tíðindamiðlar verður býttur út eftir nýggjum leisti. Farið verður frá, at søkt verður um stuðul við útgangsstøði í lønarútreiðslum, til at miðlarnir kunnu søkja stuðul til ítøkiligar verkætlanir.

Viðmerkingar til uppskotið eru vælkomnar í seinasta lagi **hósdagin 21. januar 2021.**

Vinaliga / Yours sincerely

Alda Joensen
Fulltrúi/Senior Principal

Uttanríkis- og mentamálaráðið/Ministry of Foreign Affairs and Culture
Tinghúsvegur 5-7 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. +298 306531 • Mobile +298 555041
aldaj@mmr.fo **www.mmr.fo**

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Dagfesting:	04.01.2021
Mál nr.:	Skrivið her
Málsviðgjørt:	AJ/TH
Ummælisfreist:	Skrivið frá/til
Eftirkannað:	Lógartænastan dagfestir

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um miðlastuðul
(Broyting til verkætlanarstuðul)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 35 frá 31. mars 2017 um miðlastuðul verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1 stk. 2 verður "ein árligan" strikað.

2. § 4, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 2.* Miðlastuðul verður latin verkætlanum, sum leggja seg eftir at gera loftborið ella skrivligt tilfar, sum verður mett at hava journalistiska dygd og samfelagsligt virði."

3. § 4, stk. 3 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 3.* Stuðul til verkætlanir verður latin til virksemi, ið verður framt í eitt avmarkað tíðarskeið við einum ítøkiligum endamáli og úrsliti."

4. Í § 4 verður sett inn sum nýtt stk. 4:

"*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri treytir fyri stuðli."

5. § 8, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"**§ 8.** Miðilin skal saman við stuðulsumsóknini skjalprógva, at treytirnar fyri stuðli sbrt. §§ 2 og 3 eru loknar.

6. Í § 8 verður sum nýtt stk. 4 sett inn:

"*Stk. 4.* Eftir at verkætlan sambært § 4, stk. 2 er liðug, skal viðkomandi miðil lata Miðlastuðulsnevndini roknskap fyri verkætlanina. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um krøv til roknskapin."

Stk. 4 verður eftir hetta stk. 5.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Landsstýrismaðurin ynskir at broyta leistin fyri, hvussu miðlastuðulin verður veittur. Tað skal tryggjast, at miðlastuðulin livir upp til tað endamál, hann er ætlaður til. Síðan 2017 er játtan sett av á fíggjarlógini til tess at hækka dygdina í journalistiska arbeiðinum og at tryggja eitt fjøltáttað útboð av tíðindamiðlum. Mett verður ikki, at verandi leistur fyri býtið av miðlastuðlinum tryggjar dygdina í journalistiska arbeiðinum í nóg stóran mun. Tí verður skotið upp at áseta nýggjan leist í lógina, ið byggir á umsóknir um ávísar verkætlanir.

1.2. Galdandi lóggáva

Lógin um miðlastuðul er frá 2016 og er grundarlag fyri tann stuðulin, sum Løgtingið samtykti at játta privatu tíðindamiðlunum við virknaði frá 2017. Leisturin hevur verið, at 40% av játtanini verður býtt javnt út sum ein grundupphædd til allar teir miðlar, ið søkja og lúka treytirnar fyri at fáa stuðul. 60% verður býtt út sum stuðul í mun til rakstrarútreiðslurnar hjá miðlinum árið fyri. Stuðulin hevur verið veittur tíðindamiðlum, hvørs redaksjonella innihald í stóran mun er kritiskur journalistikkur og sjálvstøðug journalistisk viðgerð av aktuellum føroyskum samfelagsviðurskiftum og viðkomandi altjóða viðurskiftum úr einum føroyskum sjónarhorni.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Uppskotið hevur til endamáls at tryggja, at miðlastuðulin verður býttur út eftir nýggjum leisti, sum skal vera við til at hækka dygdina í journalistiska arbeiðinum. Miðlarnir skulu við miðlastuðlinum fáa møguleika fyri at fara í dýpdina og skapa tilfar av høgari góðsku. Treytir fyri stuðlinum skulu ásetast í kunngerð, og krøv til umsóknina verða ásett, eitt nú um verkætlanarlýsing, undir hesum, hugskot og førleikar hjá umsøkjara. Ásettar verða eisini reglur fyri vav av verkætlan, t.e. at væntandi verður eitt minstamark og eitt hægstamark sett fyri tíðina, ein verkætlan, ið fær stuðul, kann vara.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið leggur upp til, at miðlastuðulin verður býttur eftir nýggjum leisti. Farið verður frá, at miðlarnir søkja stuðul við útgangsstøði í lønarútreiðslunum, til at søkt verður við útgangsstøði í ítøkiligari verkætlan. Landsstýrismaðurin metir ikki, at verandi skipan fremur størri dygd í miðlunum, og at miðlalandslagið sum heild er vorðið betur fyri. Tí verður lagt upp fyri at fara yvir til verkætlanarstuðul, har dygdargóðar journalistiskar verkætlanir fáa lut í stuðlinum.

Við eini slíkari skipan verður tørvur á at menna eitt sakligt metingargrundarlag, sum miðlastuðulin kann verða bygdur á. Her kann talan verða um journalistiskar greinarøðir av ymsum slagi ella um aðrar framleiðslur, sum verða mettar at hava journalistiskt virði. Dentur kann t.d. verða lagdur á, at øll øki í landinum verða tikin við, og hugt kann verða at fjølbroytninum í tí, sum miðlarnir velja at lýsa. Tá miðlarnir fáa stuðul til at fara í dýpdina, fer væntandi eisini ein menning av journalistisku førleikunum fram. Tað er vanligt, tá talan er um stuðul á øðrum mentanarøkjum, at stuðulin verður veittur við grundarlagi í ítøkiligari umsókn, ið grundgevur fyri, hví stuðul eigur at verða veittur. Um stuðulin verður á sama støði sum í

dag, verður talan um tilsamans eini 5-6 ársverk av viðgerandi journalistikki, sum eisini kann eftirmetast og mátast. Við verandi leisti hvørvur stuðulin í rakstri.

Tað verða ymsir møguleikar hjá miðlunum at grunda sínar umsóknir á. Hugsast kann, at ein miðil kann leysgeva fólk á redaksjónini til ávísa verkætlan, ella at miðilin lýsir eftir fólki at skriva tilfar fyri teir stuðulspengar, miðilin søkir um. Á henda hátt hækkar dygdin automatiskt í miðlinum.

Tað verður framhaldandi Miðlastuðulsnevndin, ið skal viðgera umsóknirnar, men frá 2021 verður tað, sum frágreitt, við støði í verkætlanum. Nærri treytir fyri stuðli verða ásettar í kunngerð. Fyri at stuðla upp undir, at miðlarnir fara at søkja, er sannlíkt, at partur av játtaða verkætlanarstuðlinum verður goldin, tá verkætlanin byrjar, og restin tá hon er endað. Miðilin eigur at senda Miðlastuðulsnevndini verkætlanartilfarið sum skjalprógv við verkætlanarlok. Lagt verður upp fyri, at fleiri umsóknarumfør verða á hvørjum ári.

Samanumtikið er høvuðsendamálið við miðlastuðlinum óbroytt, t.e. at tíðindamiðlarnir fáa betri møguleikar at framleiða dygdargott tilfar, byggja upp vitan og fyri at birta upp undir eitt upplýst og virkið alment kjak. Við nýggja leistinum verður mett, at hetta í roynd og veru fer at síggjast aftur í miðlatilfarinum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, Dimmalætting, Felagnum Netmiðlar, Fíggjarmálaráðnum, FM1, Fróðskaparsetri Føroya, Føroyskum Miðlafólkum, in.fo, jn.fo, Kringvarpi Føroya, Lindini, Miðlahúsinum, Norðlýsinum, portal.fo, R7 Kringvarp, Radio.fo, Starvsmannafelagnum, TAKS, Vinnuhúsinum og vp.fo.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið kann fáa fíggjarligar avleiðingar fyri aðalráðið, ið ber kostnaðin av Miðlastuðulsnevndini. Væntandi verður talan um fleiri stuðulsumfør í einum ári, og tað ger arbeiðið hjá Miðlastuðulsnevndini rúgvismiklari. Harumframt verður møguliga talan um broytta samsýning til Miðlastuðulsnevndina. Í dag fáa limirnir fundarpening.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið fer væntandi at krevja meir umsiting í avvarðandi aðalráði, um eitt nú fleiri umsóknarumfør verða árliga.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna. Miðlastuðulin verður býttur eftir nýggjum leisti, har býtið kann gerast øðrvísi, enn tað hevur verið higartil. Teir miðlar, ið hava fingið ávísan stuðul eftir verandi leisti, skulu laga seg at nýggja leistinum og søkja til ávísar verkætlanir. Væntandi skulu miðlarnir brúka meir tíð upp á at skriva umsóknir, ið skulu verða væl grundgivnar eftir nærri ásettum treytum.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki bindingar til millumtjóðasáttmálar, ið gera, at uppskotið fær fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagsbólkar ella vinnuna.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, herundir Evropeiska mannarættindasáttmálan ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvislig ar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Til nr. 1
Orðini "ein árligan" verða strikað, tí talan verður ikki longur um stuðul, ið verður útgoldin eina ferð um árið, men heldur í fleiri umførum sambært teimum reglum, ið landsstýrismaðurin fer at áseta í nýggja stk. 4 í § 4.

Til nr. 2
Við verkætlan er at skilja greinarøð, heimildarsending, poddvarp ella annað mangt tilfar, ið tíðindamiðlar framleiða.

Til nr. 3
Ein verkætlan varir í eitt avmarkað tíðarskeið. Nærri reglur verða ásettar í kunngerð, men talan verður um eitt minstamark og eitt hægstamark, sum verkætlanin kann vara. Í umsóknini verður tilskilað eitt ítøkiligt endamál við verkætlanini, og hvat úrslitið verður.

Til nr. 4
Landsstýrismaðurin fær heimild til at áseta nærri treytir og reglur fyri stuðli, umframt tær ið longu eru galdandi sambært lógini. Krøv verða ásett til umsóknina, eitt nú um verkætlanarlýsing, hugskot og førleikar hjá umsøkjara og møguligum miðlatoymi. Ásettar verða eisini reglur fyri, hvussu leingi ein verkætlan kann vara. Tá verkætlan er lokin, skal miðilin senda Miðlastuðulsnevndini verkætlanartilfarið sum skjalprógv umframt roknskap sambært játtanarskipan landsins.

Til nr. 5
Ásetingin verður broytt soleiðis, at miðilin skal skjalprógva, at hann lýkur treytirnar í §§ 2 og 3, men ikki longur skal lata inn roknskap fyri skjalprógvaðar lønarútreiðslur. Orsøkin er, at tað ikki longur verður søkt við støði í lønarútreiðslunum í undanfarna ári.

Til nr. 6
Ásett verður, at eftir at verkætlan sbrt. § 4, stk. 2 er liðug, skal miðilin lata Miðlastuðulsnevndini roknskap fyri verkætlanina. Endamálið er at tryggja, at stuðulin er nýttur til endamálið, ið søkt var til. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um krøv til roknskapin.

Til § 2

Áseting um gildiskomu.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, xx.01.2021

Jenis av Rana
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen